# Gloymið alt um oljukekkin

**Inntøkurnar frá oljuvinnuni í Føroyum skulu fara í ein grunn, men hesin skal vera leysur frá hinum pørtunum av føroyska búskapinum. Oljuvinnan kann gerast avgerandi stuðulin hjá fiskivinnuni, sigur Menas, sum hevur gjørt eina kanning um árini av einari umfatandi oljuvinnu í Føroyum. Avgerðin liggur hjá føroyingum, men kjakið eigur at byrja beinanvegin, um líkinda úrslit skal spyrjast burturúr**




*Oljukekkurin er ikki nakað gott hugskot fyri føroyska búskapin, halda serfrøðingar frá bretsku ráðgevingar fyritøkuni Mensa. Pengarnir eiga at vera settir í grunn, sum skal haldast uttanfyri hinar partarnar av føroyska búskapinum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

KANNING
*Heri á Rógvi*

Síðani í mai mánað 2000 hevur bretsk ráðgevingarfyritøka verið í holt við eina kanning um árini av einari størri oljuvinnu í Føroyum. Kanningin hevur enska heitið: A Study of The Impact of The Development of Hydrocarbon Resources on The Faroe Islands.

Ráðgevingarfyritøkan, talan er um, er Menas. Tað eru mestir ikki nógv, ið kenna tað nógva til hesa fyritøka, men vit kunnu stutt lýsa fyritøkuna sum eina bretska ráðgevingarfyritøka, sum síðani 1982 hevur ráðgivið almennum og privatum innanfyri politikk, búskap og vinnulív. Fyritøkan skal ikki blandast við felagsskapin Mensa, hóast onkur kanska er við í báðum tveimum. Menas hevur royndir við at smásamfeløgum. John Christensen, ið hevur staðið á odda fyri kanningini er eisini sjálvur av oynni Jersey.

Til at hjálpa sær við hesari kanningini, fingu menninir hjá Menas køna hjálp frá Fróðskaparsetri Føroya. Føroyskir serfrøðingar hava síðani í fjør vár arbeitt saman við fleiri altjóða serfrøðing við at gera hesa kanningina. Orðið kanning er mestir tann best hóskandi lýsingin av arbeiðinum hjá Mensa og Fróðskaparsetri Føroya.

Sjálvt leggur Menas ógvuliga stóran dent á, at kanningin eigur at vera mett sum eitt slag av kortleggjan føroyska samfelagin í dag og í sambandi við oljuna. Kanningin skal ikki metast sum ein verkætlan, har sagt verður soleiðis og soleiðis, hóast teir í fleiri førum koma við uppskotum um, hvussu kundi verið gjørt, aloftast grundað á samanberingar. Teirra boðskapur við hesum og fremsta endamál er at eggja til alment kjak um teir spurningar, sum verða settir fram og viðgjørdir í teirra kanning. Teir siga seg ikki hava endaliga svarið til spurningarnar, men hetta skal eitt alment orðaskifti til at avgera, hvørja leið Føroyar ætla at ganga. Reyði tráðurin í kanningini er, at føroysku myndugleikararnir eiga at leggja eina ítøkiliga ætlan, hvat vit vilja hava burturúr, og hvussu hetta skal gerast. Menas menninir siga, at tað enn er tíð til at fáa neyðugar ásetingar settar í verk, og ein yvirordnaður politikkur kann enn verða staðfestur. Hóast tað enn er óvist nær ein framleiðslu oljuvinnan fer at byrja í Føroyum, ella um ein tílík yvirhøvur verður til nakað, so merkir hetta ikki, at føroyingar eiga at seta seg niður at bíða eftir svørtu dropunum.

-Tað snýr seg um at koma ígongd beinanvegin, ljóðar boðskapurin frá John Christensen, Jay Wagner og Stephen Royle, ið umboðu Menas á ojuráðstevnuni fyrr í vikuni.

Burturúr kanningini eru ein 360 síður frágreiðing. Hetta er kanska ikki nógv í mun til tað so kendu bankakanninga, men allíkavæl fer kannigin hjá Mensa og monnunum á Rossatrøðni rættiliga víða, hóast ikki allar niðurstøðar eru nóg mikið til eina yvirskrift. Henda er stytt niður í teir ymisku partarnar, tá ið kanningin hyggur eftir fleiri økjum, eitt sosialu fylgjunum og fíggjarligu fylgjunum. Eisini er ein 15 síður samandráttur gjørdur. Hesin er júst almennakunngjørdur, og tað er fyri tað nógvan hesin, sum henda greinin er grundað á. Á oljuráðstevnuni, Offshore Faroes 2001, var tað fyrst og fremst tann politiski og sosiali parturin av kanningini, ið varð lagdur fram. Kanningin umfatar eisini eina búskaparliga meting, har samanborið verður nógv við Hetland.

Tann parturin av kanningini, sum snýr seg um umhvørvi er grundaður á ásetingar í Agenda 21, sum eru altjóða umhvørvisásetingar fyri hesa 21. øldina.

## Støðumynd

Eftir at manningin var sett, fóru teir undir at gera hesa góðu kanning. Tá teir fóru undir nakað sum líkist einari kortlegging, so var tað kanska natúrligt at byrja við einari støðumynd. Fyri uttan at fáa greiða á teimum búskaparliga og politisku viðurskiftunum, so vildi manningin eisini gera sær eina mynd av, hvat føroyingar seta í samband við teirra samleika sum føroyingar. Fyri uttan lyklapersónar (leysliga umsett), slap almenningurin eisini til orðanna. Hetta var gjørt í bólkum, sum vóru settir saman av »vanligum« fólkum, og so leitaðu Menas menninir eisini innum skúlagátt, fyri at gera sær eina mynd av yngra ættarliðnum. Her er talan um tað kvalitativa háttalagið, har upplýsingar verða savnaðir sum meiningar hjá júst hesum persónunum, ið vórðu spurdir, ikki umboðandi fyri alt fólkið so sum í einari veljarakanning.

Úrslitið av samrøðunum og kjakinum, sum kanningarfólkið fylgdi við í, var, at teir fingu staðfest nøkur viðurskifti viðvíkjandi føroyska samleikanum.




*Teir tríggir, f.v. Jay Wagner, John Christensen og Stephen Royle, eru partar av liðnum, sum hevur gjørt hesa kanningina um Føroyar og olju.*

*Mynd: Heri á Rógvi.*

Sambært kanningini er føroyska samfelagið ein blandingur av modernaðum og siðvenjubundnum virðum. Fremsta eyðkenni fyri føroyskan samleika er føroyska málið, sigur kanningin. Føroyingar broytast meira og meira móti teimum modernaðu lívsvirðunum við eitt arbeiðsvali, men vilja framvegis halda fast við tey eldru føroysku virðini, og sum heild eru føroyingar rættiliga afturhaldandi mótvegis fremmandum íleggingum í tað føroyska samfelagið.

## Fiskivinnan

Spurningurin um hvussu oljan og fiskivinnan fara at einast er rættiliga kendur, hóast tað ikki hevur so ovurhonds nógv av kjaki um henda spurning. Hægri lønarlag og skaði á umhvørvi og fiskileiðir eru nakrir av spurningunum, sum hava verið settir fram.

Í kanningini hjá Menas verður ikki hugt sum um at hesa verið sum hundur og ketta. Sambært kanningini, so eiga vit heldur at hyggja eftir oljuvinnuni sum ein møguleika at gera fiskivinnuna betur, effektivisera. Vitanarstøði fer væntandi at hækka, og hetta eigur at koma øllum til góðar. Tað kann væl hugsast, at fiskiflotin og fiskivinnan sum heild fara at gerast minni, men hetta vil gera sterkari eindir. Sambært kanningini, so vil hetta gagna fiskivinnuni og samfelagnum yvir eitt longri tíðarskeið, hóast skiftistíðin kann fara at gerast eitt buldraslig.

## Búskapurin

Gongur mann útfrá, at oljuvinnan kemur til eina framleiðslufasu í Føroyum, so fer hetta at merkja føroyska búskapin. Tað er stýringin av hesum, sum verður tað mest neyðturvuliga at fáa greiða á skjótast gjørligt.

Fyri at gera ein langa søga stutta, so kunnu vit siga, at kanningin leggur upp til, at oljupeningurin verður koyrdur í ein grunn, men hesin verður leysur frá hinum pørtunum av føroyska búskapinum. Grunnurin líkist kanska mest í modellinum, sum vit kenna úr Hetlandi, har ein oljugrunnur verður brúktur til at stimbra útbúgving og mentan, og eisini fyri ein part infrastrukturin.

Skipanin við einum oljukekki, sum tey hava í Alaska, er ikki nøkur góð loysn sambært serfrøðingunum hjá Menas. Hetta vil í síðsta enda skaða búskapin, tá ið nýtslan vil veksa rættiliga nógv eftir so stuttari tíð, og tá er vandi fyri inflatión.

John Cristensen sigur, at tað í Føroyum ikki er vandi fyri tí sokallaða hálendsku sjúkuni, sum serfrøðingar meta gera seg galdandi í Norra. Hetta skyldast, tí at føroyska krónan jú er tað sama sum hin danska. Hálendska sjúkan viðførir høgt lønarlag, og kappingarføri minkar eisin av tí sama.

## Ber saman við Hetland

Til at samenbera við nýtir kanningin fyri tað nógva Hetland. John Christen greiðir frá, at hetta er tí, at Hetland og Føroyar á so nógvum økjum líkjast. At kalla einki arbeiðsloysi er í Føroyum, og tað var tað heldur ikki, tá ið oljan kom til Hetlands. Politikkurin hjá um at afturhalda (contain) bæði sjálva oljuvinnuna og oljuarbeiðararnar. Eisini hava teir í Hetlandi ein felagsskap við Skotland, sum minnir nógv um okkara ríkisfelagsskap, hóast hesir eru hvør sítt.

Hetlendingar valdu loysnina við einum oljugrunni, sum tað eisini verður brúkt. Ikki sum í Norra, har oljugrunnurin bert veksur og veksur mest sum óendaligt. Ikki tí hetlendski oljugrunnurin veksur eisini, men hesin hevur grundarlagið undir stóran parti av hækkaða støðinum innan mentan og infrastruktur.

Menas kanningin metir hetlendsku loysnina vera á góðari leið, og hetta verður eisini fyri ein stóran part tilmælt. Serliga tað, at oljuvinnan verður afturhildið ella isolerað er nakað, sum mestir kann hugsast í Føroyum.

Kanningin metir eisini, at ríkisfelagsskapurin, t.e. mest búskaparliga samstarvið, vil steðga ella minka um eina møguliga stórinflatión, tá ið oljuvinnan kemur. Kanningin gongur útfrá, at ongin olja verður tikin í land í Føroyum.

Sum heild kann tað sigast, at kanningin sær minst líka nógvar møguleikar sum vansar við einari oljuvinnu í Føroyum. Tað er bert upp til føroyingar at avgera, hvussu og hvat á teimum mongu økjunum, eisini teir grundleggjandi spurningarnir. Ráðini eru at byrja beinanvegin.

Tað er BP, sum hevur fíggjað kanningina. Kanningin eggjar staðiliga til, at fleiri kanningar verða gjørdar.



# Lønartalvan liggur í buktini

**Formaðurin í pedagogfelagnum sigur, at mótparturin hevur brotið eina avtalu við ikki at góðtaka eina lønartalvu, sum tey í felag hava gjørt. Tummas Magnussen, samráðingarleiðari, sigur hinvegin, at eingin felags lønartalva er gjørd og var ikki við í upprunaliga kravinum frá pedagogunum. Nú er nýggj lønartalva gjørd**

VERKFALL
*Stefan í Skorini*



*Pedagogarnir eru enn í verkfalli. Mikudagin vóru teir í tinginum og lurtaðu, tá Karsten Hansen svaraði fyrispurningum um verkfallið*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað er lønartalvan, sum er orsøk til verkfallið. Um pedagogfelagið fær eina lønartalvu, ið umfatar bæði pedagogar og tænastumenn, so verður verkfallið avblást.

Carita Bjørklund, formaður í pedagogfelagnum, sigur, at báðir partar høvdu sett ein arbeiðsbólk at gera eina felags lønartalvu, ið umfataði bæði pedagogar og tænastumenn.

– Tá arbeiðið við hesi lønartalvu varð liðugt, sigur fíggjarmálastýrið, at tænastumenninir ikki kunnu vera við í henni. Hetta ber ikki til at siga aftaná, tá arbeiðsbólkurin, ið gjørdi lønartalvuna, er liðugur við sítt arbeiði. Tað tekur grundalagið undan útrokningini av talvuni. sigur Carita Bjørklund.

Hon sigur, at um pedagogarnir fáa tænastumenninar við í lønartalvuna, so verður verkfallið avblást.

## Mótparturin ósamdur

Mótparturin hjá pedagogunum er ikki samdur við hesi útgávuni av søguni. Tummas Magnussen, ið er samráðingarleiðari hjá kommununum og fíggjarmálastýrinum, sigur, at arbeiðsbólkurin als ikki hevur gjørt eina fullfíggjaða lønartalvu fyri bæði pedagogar og tænastumenn. Tað er hinvegin pedagogfelagið, ið hevur lagt eina slíka lønartalvu fram.

Tí sigur Carita Bjørklund ósatt um lønartalvuna, sambært Tummasi Magnussen.

Nú hevur fíggjarmálastýrið gjørt eina lønartalvu fyri bæði tænastumenn og pedagogar. Hetta er lønartalvan hjá tænastumonnum, har pedagogarnir eru settir inn.

Tummas Magnussen sigur, at hann hevur sent semingsmonnunum hesa lønartalvu, mikukvøldið. Nú skulu teir so taka støðu til, hvat teir gera við hana.

– Orsøkin til at vit hava gjørt hesa lønartalvuna er, at vit mugu fáa ein enda á hesum verkfallinum. Vit fingu eina áheitan frá pedagogfelagnum via semingsmenninar mánakvøldið um at gera eina lønartalvu við báðum starvsbólkunum. Hana hava vit gjørt og vóna, at pedagogfelagið fer at taka undir við hesi lønartalvuni, sigur Tummas Magnussen.

## Óvist um undantaksloyvir

Annars sigur Carita Bjørklund, at nevndin ikki hevur tikið støðu til, um undantaksloyvini skulu takast aftur. Tíð hevur ikki verið at umrøða henda spurningin, tí onnur mál hava verið á skránni.

Ein hópur av pedagogum vóru og lurtaðu eftir Karsten Hansen í tinginum í gjár, tá landsstýrismaðurin við fíggjarmálum svaraði fyrispurningum frá Annitu á Fríðriksmørk og Katrin Dahl Jakobsen.

Carita sigur seg øtast um tey ósannindi, ið Karsten Hansen bar fram á tingsins røðarapalli mikudagin. Hon sipar til m.a. til hetta brotið úr svarinum hjá landsstýrismanninum.

– Eg kann tí vísa aftur, at Fíggjarmálastýrið skal hava forkastað eina lønartalvu, sum arbeiðsbólkurin kom til, tí sum eg havi greitt frá, so gjørdi arbeiðsbólkurin ikki nakra lønartalvu, sigur Karsten í svarinum.

# Grótrætt skal ruddast

**Klaksvíkar kommuna bjóðar nú vinnulívinum at byggja goymsluhallir á Grótrætt, har økið er vorðið óruddiligt og óskipað**

HAVNALAG
*Eyðun Klakstein*



*Økið á Grótrætt, stutt norðan fyri Klaksvík, skal nú skipast betur, og Klaksvíkar kommuna kemur við hugskotinum, at vinnan sjálv byggir tvær goymsluhallir á økinum*

**Klaksvík:** Klaksvíkar kommuna ætlar at lata goymsluøkið á Grótrætt til vinnulívið at byggja hallir á.

Hetta økið, sum liggur stutt norðan fyri Klaksvík, hevur verið brúkt sum goymsluøkið hjá sjóvinnuni, men nú er økið vorðið óskipað og óruddiligt.

Tí kemur Klaksvíkar kommunua við hugskotinum um at skipað økið betur, og tað verður lagt upp til, at vinnan sjálv tekur sær av at byggja og reka tvær goymsluhallir har.

– Vit vilja skapa vinnuni so góð kor sum gjørligt, og tí taka vit nú stig til hetta. Tað er javnan at vit frætta um, at fyritøkur og virki mangla goymslupláss. Nú bjóða vit teimum at taka seg saman og byggja tvær goymsuhallir á hesum øki. Kommunan vil hjálpa til og stuðla ætlanini, sigur Torleif Sigurðsson, sum er formaður í havnanevndini hjá Klaksvíkar kommunu.

## Privatir byggja

Klaksvíkar kommuna hevur kannað økið, og teir siga, at pláss er fyri tveimum hallum á umleið 660 fermetrar. Ætlanin er, at hesar allir skulu býtast upp, so tey ymsu virkini, skipini ella fyritøkurnar fáa sítt egna pláss at ráða yvir.

– Vit mæla til, at vinnan tekur seg saman, ger ein nevnd, sum skal finna út av fígging, bygging og skipanin við hallunum. Á hendan hátt fær vinnan júst tað, sum hon ynskir sær, sigur Torleif Sigurðsson.

Hugskotið er, at eitt partafelag skal byggja hallirnar, og síðani skulu tær leigast út í pørtum til tey, sum hava áhugað í teimum.

– Vit eru púra ósamd við teimum, sum halda, at Klaksvíkar havn fer ongan týdning at hava, tá vit hava fingið undirsjóvartunnil. Vit skulu hinvegin byggja út og skipað havnalagið enn betri, so vit hava ein góða havn, eisini eftir at undirsjóvartunnilin kemur, sigur Torleif Sigurðsson.

Klaksvíkar kommuna ynskir nú at frætta frá teimum, sum hava áhuga í at verða við í byggingini.